# Jústinus aftur í Runavík



Miðvallarspælarin Justinus R. Hansen hevur gjørt avtalu við NSÍ um næsta kappingarár. Jústinus hevur farna ári verið burturstaddur, men nú kemur hann heimaftur at búgva. Og í Runavík taka tey gleðiliga ímóti miðvallarspælaranum, sum eisini hevur spælt bakkur onkuntíð. NSÍ og Jústinus R. Hansen hava gjørt avtalu um næsta kappingarár.

# Palli aftur í Vági

Palli Augustinussen verður aftur at síggja í føroyskum fótbólti komandi ár. Heimasíðan hjá VB/Sumba skrivar, at vágbingurin hevur gjørt avtalu við felagið. Palli Augustinussen fekk sítt gjøgnumbrot, tá VB vann føroyameistaraheitið í ár 2000. Seinnu árini hevur hann verið í Danmark í lestrarørindum, har hann hevur spælt við ÍF Føroyum og Næstved. Palli Augustinussen hevur eina ferð umboðað føroyska landsliðið.

# Dómari hóttur eftir lívinum

**Martin Hansson, sum dømdi dystin millum Liverpool og Atlético Madrid, hevur fingið fleiri morðhóttanir, síðani hann dømdi brotsspark til Steven Gerrard**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var kanska ikki heilt óuppiborið, at Liverpool at enda javnaði til 1-1, tá teir fyri trimum vikum síðani spældu móti Atlético Madrid í Champions League bólkaspælinum.

Men tey flestu mundu vera samd um, at talan var um eitt brotsspark av bíligara slagnum, sum Steven Gerrard fekk, tá hann í 94. minutti fór um koll í brotsteiginum.

Gerrard sendi sjálvur brotssparkið í netið, og tað hevur fingið ilt í hópin av viðhaldsfólki hjá Atlético Madrid. Somikið stór er øðin, at Martin Hansson fleiri ferðir er hóttur eftir lívinum seinastu vikurnar.

- Fyrr havi eg altíð havt mína fartelefon tendraða, men eftir at nummarið hjá mær er lagt út á alnetið, noyðist eg at sløkkja. Hetta tí eg støðugt fekk bæði uppringingar og SMS. Summi av hesum enntá við morðhóttanum, og tað er sjálvandi einki stuttligt, sigur Hansson við svenska Expressen.

Fyri fýra árum síðani gavst landsmaðurin hjá Hansson, Anders Frisk, eftir líknandi hóttanir, men Hansson sigur tó, at hann hevur ikki ætlanir um at gevast.

- Hugurin at gevast hevur nokk ongan tíð verið meira enn tann sami. Men eg havi kortini tikið avgerð um, at hetta skal ikki steðga mær, sigur hann við svenska blaðið.



*Síðani hann dømdi brotsspark til Liverpool fyri trimum vikum síðani, hevur Martin Hansson móttikið fleiri morðhóttanir frá illum Atlético Madrid-fjepparum*
*Mynd: Polfoto/AP*

# AB fær verjuspælara úr Arsenal

**AB hevur gjørt avtalu við argentiskan verjuleikara, sum ætlandi skal verða við til at halda felagnum í bestu deildini**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Tað er einki dulsmál, at fyri meg er sáttmálin við AB ein lopfjøl til evropeiska meginlandið, men eg gleði meg ómetaliga nógv til at koma til Føroya, sum eg bara havi hoyrt gott um.

Orðini eigur Leonel Peña, sum í komandi kappingarári skal royna seg á Argjum. Heimasíðan hjá AB skrivar nevnliga, at argentiski verjuleikarin hevur gjørt avtalu við felagið.

Peña er 22 ára gamal, og hevur seinast leikt við argentinska felagnum Arsenal de Sarandi, sum spælur í bestu deildini. Hann hevur eisini roynt seg sum vongverja og verjukendur miðvallari.

- Vit hava gjørt sáttmála við Leonel Peña, tí eftir tí vit hava hoyrt og tí vit hava sæð, so ivast vit ikki í, at hann kann styrkja munandi um verjupartin hjá okkum, sigur Sjúrður Olsen, umboð úr AB, við heimasíðu felagsins.

Sáttmálin er komin í lag umvegis Trans Atlantic Talent Agancy, sum áður millum annað hevur fingið Rodrigo til KÍ.



*22 ára gamli Peña skal styrkja um Formulaliðið hjá AB komandi kappingarár*

## Dystaryvirlit

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 23.11 | 14.30 | Neistin-Stjørnan |
| 23.11 | 15.00 | Tjaldur-Kyndil |
| 23.11 | 15.00 | VB-StÍF |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 22.11 | 15.00 | KÍF-Dráttur |
| 22.11 | 16.00 | ÍF-Mjølnir |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 22.11 | 14.00 | ÍF-Mjølnir |
| 23.11 | 14.00 | SÍ-Fleyr |




## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 163 | 118 | 45 | 10 |
| 2 VB | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 161 | 138 | 23 | 10 |
| 3 Neistin | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 152 | 133 | 19 | 7 |
| 4 Tjaldur | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 150 | 139 | 11 | 7 |
| 5 StÍF | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 137 | 179 | -42 | 2 |
| 6 Kyndil | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 107 | 163 | -56 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 161 | 146 | 15 | 10 |
| 2 H71 | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 159 | 140 | 19 | 8 |
| 3 Neistin | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 182 | 171 | 11 | 8 |
| 4 StÍF | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 146 | 141 | 5 | 7 |
| 5 KÍF | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 136 | 158 | -22 | 2 |
| 6 Kyndil | 6 | 0 | - | 1 | - | 5 | 139 | 167 | -28 | 1 |

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 6 | 6 | - | 0 | 18 | 7 | 11 | 12 |
| 2 Mjølnir | 6 | 4 | - | 2 | 13 | 7 | 6 | 8 |
| 3 Dráttur | 6 | 4 | - | 2 | 14 | 10 | 4 | 8 |
| 4 Fleyr | 6 | 4 | - | 2 | 13 | 9 | 4 | 8 |
| 5 ÍF | 6 | 2 | - | 4 | 10 | 12 | -2 | 4 |
| 6 KÍF | 6 | 1 | - | 5 | 9 | 15 | -6 | 2 |
| 7 TB | 6 | 0 | - | 6 | 1 | 18 | -17 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 2 | 1 | 2 |
| 2 ÍF | 2 | 1 | - | 1 | 5 | 4 | 1 | 2 |
| 3 Fleyr | 2 | 1 | - | 1 | 4 | 4 | 0 | 2 |
| 4 Mjølnir | 1 | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |